# Allir svimjararnir komu fram

**11 svimjarar tóku lut í svimjingini um Nólsoyarfjørð, og allir vóru mentir at fullføra teinin – enntá svam ein svimjari seg beint inn á bátadráttin**



*Við tíðini 1.31.53, vann Dia Jacobsen kappingina. Í hølunum á vinnaranum kom Evald Rasmussen (1.32.55) og á triðja plássi var Kári Simonsen (1.41.3). Sostatt stendir metið hjá Dia Jacobsen (1.20.27) enn sum skjótasta tíðin, hetta svam hann í fjør*

FJARÐASVIMJUING
*Jákup av Skarði*

Ymiskt er, hvussu svimjararnir fyrireika seg undan hesum árliga tiltaki, ið millum summar svimjarar er ein kapping, men millum flestu luttakararnar er ein roynd, at vita, um ein veruliga megnar at fullføra teinin.

Klokkan var hálvgum ellivu, leygardagin 17. august, tá ið svimjararnir møttu úti við Strond, í hølunum hjá Radioamatørunum. Okkurt andlit var kent men nýggir svimjarar vóru eisini í hópinum. Tó var havt á munni, at okkurt konufólk átti at havt meldað til, tí tíðirnar hjá kvinnunum hava eisini verið góðar okkurt árið.

Svimjararnir prátaðu ymiskt hvussu best var at leggja sær leiðina um fjørðin og Erlendur Simonsen gav øllum seinastu boðini áðrenn menn fóru í svimjibúnarnar.

### 4 km í køldum sjógvi

»Eitt sindur ókyrt« helt onkur áskoðari, ið leitað hevði sær út við Strond. Men hetta helt ikki svimjarunum aftur. Teir fóru oman í fjørðuna og kannaðu, hvussu bátarnir lógu.

Beint eftir døgurða varð skotið av, og fyrsta svimjararnir gjørdu var at finna á bátin teir høvdu til at taka. Síðani løgdu allir á suðureftir so streymurin úti við oynna ikki skuldi føra teir norður um Stongina.

Neyðugt er at seta trygdina í hásæti til slíkt tiltak, og tískil vóru bæði hjálparbátar og samarittar við svimjarunum tvørtur um fjørðin. Sjógvurin er sum vera man kaldur og teinurin svomin verður er 4 km.

Dia Jacobsen var 1 min. skjótari enn Evald!

Í ár gingu 2 tímar, 25 min., og 38 sek, so vóru allir svimjararnir komnir á mál. Okkurt árið er luttakari givin og farin í bátin. Men teir tíggju luttakararnir, ið ikki komu beint á mál í ár, gjørdu sítt ítarsta at renna seinasta teinin.

Við tíðini 1.31.53, vann Dia Jacobsen kappingina. Í hølunum á vinnaranum kom Evald Rasmussen (1.32.55) og á triðja plássi var Kári Simonsen (1.41.3). Sostatt stendir metið hjá Dia Jacobsen (1.20.27) enn sum skjótasta tíðin, hetta svam hann í fjør.

Við bestu ynskjum, at nógvir svimjarar meldað til aftur komandi ár, takka fyrireikararnir fyri í ár.



*Nógv fólk varð komið saman við húsini hjá Radioamatørunum, har svimjararnir løgdu út á fjørðin*



*Beint eftir døgurða varð skotið av, og fyrsta svimjararnir gjørdu var at finna á bátin teir høvdu til at taka. Síðani løgdu allir á suðureftir so streymurin úti við oynna ikki skuldi føra teir norður um Stongina – ein svimjari seg beint inn á bátadráttin*



*11 svimjarar bjóðaðu seg fram at svimja um Nólsoyarfjørð - og allir megnaðu at svimja teir fýra kilometrarnar í kalda sjónum*



# Rituvík – við fyrra (i) ella seinna (y)

**Nøkur fá orð um bygdamørk og bygdanøvn í Eysturoy.**

BYGDANØVN
*Vilmund Jacobsen*

Tað er ikki bara, sum at siga tað at bera tíðindi úr Runavíkar kommunu. Bygdirnar eru fleiri í tali, og bygdamørkini kunnu tykjast ógreið hjá tí, sum ikki er uppvaksin í økinum, serliga úr sjálvari Runavíkini og inn á Glyvrar.

Síðan Sosialurin setti seg niður í Saltangará, hava vit eftir førimuni roynt at borið bygdanøvnini rætt. Tað má vera tað minsta, ið fólk, sum búgva í økinum, kunnu vænta av okkum.

Vit fara kanska onkuntíð, tá ið høvið býðst, at lata onkran staðkendan greiða okkara lesarum uttanfyri Runavíkar kommunu ítøkiliga frá, hvar mørkini eru úr Runavík og inn á Glyvrar. Eisini kundi verið áhugavert at sagt eitt sindur um bygdanøvn í øðrum kommunum, tí fleiri bygdanøvn í Eysturoy eru áhugaverd. Hví stava summi t.d. Rituvík við fyrra »i« og onnur við seinna »y«? Hví duga ikki øll fólk, sum eru uppvaksin í Gøtu, at stava Norðragøta? Hví stendur Lambi á skeltinum til Lambar – og ikki Lamba? Hví siga summi »í Skálabotni« og onnur »í Skálafirði«? Hví stendur bara Hellur á skeltinum til Hellurnar?




*Hví stava summi Rituvík við seinna "y". Er tað rætt ella skeivt? Og hví duga summi gøtufólk ikki at stava Norðragøta, men skriva Norðagøta?*

*Myndir: Vilmund Jacobsen*

### Við fyrra ella seinna?

Flestu munnu stava fuglanavnið, rita, við fyrra »i« og harvið eisini bygdanavnið, Rituvík. Men tað eru eisini tey, sum stava ryta við seinna »y«. Onkur vil ivaleyst siga, at tað seinna er skeivt, men so er ikki.

Í realskúlatíðini í Havn høvdu við frálíka læraran og gjáarmannin, Theodor Hansen, í føroyskum. Theodor varð høgt mettur sum lærari, og hjá honum fór ikki ein minuttur av tímanum til spillis. Tað argaði okkum viðhvørt, at hann bíðaði uttanfyri hurðina til skúlastovuna, til klokkan ringdi inn. So skjótt, klokkan var liðug at ringja, stóð hann inni í skúlastovuni…

Skrivaði tú stíl ella fyrisøgn og stavaði rita ella Rituvík við fyrra »i«, so fekst tú eina reyða striku yvir »i'ið« – og ein feil, tí ryta skuldi stavast við seinna »y«, segði Theodor.

Soleiðis gingu trý ár, og tú stavaði ryta við seinna »y«.

Tá ið tú eftir skúlan í Hoydølum fór at skriva bløð, valdi tú sjálvandi burtur av at stava alt, sum hevur við rytu at gera, við seinna »y«.

Men nú var tað ikki í lagi, tí ofta rættaði setarin, sum setti allan tekstin til blaðið, seinna »y« til fyrra »i«. Og soleiðis er eisini í dag. Flestu, sum hava við bløðini at gera, dáma betur at síggja rita stavað við fyrra »i«.

Í onkrari av gomlu orðabókunum stendur, at ryta stavað við seinna "y", er ein eldri staviháttur enn rita við fyrra »i«. Tískil eru báðir stavihættirnir rættir. Spurningurin er meira um »smag og behag«.

# Endurskinsvestar um alla Runavíkar kommunu

BØRN OG FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Runavíkar kommuna og Tryggingarfelagið Føroyar hava í felag tikið eitt tak til frama fyri tey smáu í ferðsluni.

Keyptir eru sonevndir endurskinsvestar til børn í barnagarðum, dagrøktini, frítíðaransingini og til børnini í 1. flokki.

Gjáramorgunin kl. 10.30 hittust hópur av børnum í Ítróttarhøllini í Runavík, har alt snúði seg um ferðslu. Eini 250 børn vóru við, og tey vóru øll í hesum gulu endurskinsvestunum.

Foreldur og fólk í Runavíkar kommunu annars gleða seg nú til at síggja fittu børnini í eyðkendu vestunum um alla kommununa.

### Trygdin í hásæti

Í tíðindaskrivi siga Runavíkar kommuna og Tryggingarfelagið Føroyar, at hugskotið um vestarnar er komið úr Noregi.

- Í Noregi er átakið við endurskinsvestum sera væl eydnað, og børnini vilja fegin ganga í vestunum. Á henda hátt kemur ferðslutrygdin í hásæti, siga partarnir aftanfyri átakið.

Tað var Runavíkar kommuna, sum vendi sær til Tryggingarfelagið Føroyar um stuðul, og ikki var meira enn hálvtalað orð, so vildi tryggingarfelagið stuðla hesum frálíka hugskoti.

Partarnir bjóðaðu fjølmiðlunum at verða við í Ítróttarhøllini í Runavík gjáramorgunin.

Ætlandi fer Sosialurin at prenta nakrar myndir frá tiltakinum í blaðnum hósdagin.



*Foreldur og fólk í Runavíkar kommunu annars gleða seg nú til at síggja fittu børnini í eyðkendu vestunum um alla kommununa.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Lítil havhestur fingin higartil



*Enn er ikki frætt frá tí stóra havhestarokinum, men týsdagin vóru bátar aftur og stimaðu. Tá ið vit frættu, vóru teir ikki komnir aftur at landi.*

HAVHESTATÍÐ
*Vilmund Jacobsen*

Enn er lítið frætt um, at menn hava fingið nakran serligan havhest kring landið, men tað er nú heldur ikki so undarligt, tí enn er so stutt útliðið.

Eitt sindur ymiskt er ár undan ári, nær havhesturin er lægstur, og nær hann kemur á sjógvin. Veðrið spælir eisini nakað inn, men fuglurin fer ikki á sjógvin, fyrr hann er búgvin til tess.

Í síðstu viku var onkur bátur og stimaði, men sum skilst, fekst ikki nakað serligt burtur úr. Tað frægasta, vit hava frætt um, er, at ein bátur í Nólsoy hevði stívliga 160 havhestar leygardagin.

Mánadagin vóru ikki havhestalíkindi, men týsdagin var hann aftur blíðari í veðrinum.

Vit hava skilt, at nakrir bátar vóru á havhestaveiði týsdagin, men tá ið vit frættu, vóru teir ikki afturkomnir.

Um viðrar, kann roknast við, at seinnaparturin av hesi vikuni verður góður til havhest, og stundir skuldu eisini verið hjá monnum, sum ætla sær ein ella fleiri túrar í komandi viku.